Fylgiskjal 5

**Annika Petersen**

**Fra:** Ari Johanneson
**Sendt:** 3. februar 2020 12:23
**Til:** Annika Petersen; VMR-Journal
**Cc:** Sørin Pram Sørensen; Sigurð í Jákupsstovu; Kári Mannbjørn Mortensen
**Emne:** Uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað v.m.

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið

Viðv. uppskoti til løgtingslóg um elektriskan útbúnað v.m.
Víst verður til uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, sí niðanfyri, sum varð sent Umhvørvisstovuni til hoyringar í telduposti 8. januar 2020.

Í kapittul 7 í lógaruppskotinum eru ásetingar um Ognartøku, og harundir eru í § 33 í lógaruppskotinum m.a. ásetingar um ognartøka viðvíkjandi fastogn til útbúnað til framleiðslu, flyting, býti og goymslu av elmegi.

Í elveitingarlógini (løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni) eru ásetingar m.a. um, at loyvi til elframleiðslu úr vindorku bert kann verða givið aftaná, at alment hevur verið lýst, at umsókn um loyvi er móttikin, og at onnur áhugað kunnu søkja um sama loyvi. Eisini eru ásetingar um, at landsstýrismaðurin, í sambandi við veitan av loyvi ella seinni, kann seta krav um, at loyvishavarar samstarva um útbúnað og savningarøki. Landsstýrismaðurin skal í viðgerðini av umsóknum um loyvi taka atlit til orkupolitikk og orkutørv landsins.

M.a. tann sannroynd, at tað kann gerast trupult at útvega hóskandi lendi til framtíðar orkuútbyggingar, talar fyri, at ein møgulig heimild at ognartaka privata og aðra ogn, eisini er viðkomandi at fáa inn í elveitingarlógina. Hetta sum eitt neyðugt amboð hjá landsstýrismanninum at kunna útfylla karmarnar í elveitingarlógini við eitt nú at kunna arbeiða fyri, at størst møguligur partur av elframleiðsluni við tíðini kann koma frá varandi orkukeldum.

Avmarkingar í at fáa atgongd til hóskandi lendi til orkuútbyggingar kunnu skjótt viðføra, at lógarásetta málið um skjótast gjørligt at grunda elframleiðsluna á varandi orkukeldur verður seinkað.

Samanumtikið verður sostatt mett, at ásetingarnar viðv. ognartøku í fyriliggjandi lógaruppskoti um elektriskan útbúnað v.m. eisini eru viðkomandi fyri elveitingarlógina. Hetta serliga við atliti til, at nakrar av høvuðsuppgávunum, sambært elveitingarlógini, eru at skapa hóskandi karmar fyri útbyggingar á elorkuøkinum, og eitt týðandi atlit í hesum samanhangi er júst atgondin til hóskandi lendi til orkuútbyggingar - serliga vindorkuútbyggingar.

Vinarliga/Best regards

Ari Johanneson
Ráðgevi

*Umhvørvisstovan / The Environment Agency*
*Tel.: +298 282860*
www.us.fo

Fra: Annika Petersen <AnnikaHenrikkaHannaP@uvmr.fo>
Sendt: 8. januar 2020 08:55

Til: sev@sev.fo; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; politi@politi.fo; FMA <fma@fma.fo>; BST Postur <bst@bst.fo>; us <us@us.fo>; Arbeiðseftirlitið <arb@arb.fo>; Landsverk <lv@lv.fo>; Vinnuhúsið <industry@industry.fo>; post@sorinskrivarin.fo
Cc: Sørin Pram Sørensen <SorinPramS@uvmr.fo>; Hilmar Høgenni <HilmarH@uvmr.fo>; Pól Edvard Egholm <pole@uvmr.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin) til hoyringar

Til hoyringarpartarnar.

Viðhefta uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin) verður hervið sent tykkum til hoyringar.
Hoyringarfreistin er sett til hósdagin 30. januar 2020.

Vinaliga sendið møguligar viðmerkingar til uvmr@uvmr.fo

Vinaliga váttið fyri móttøku.

Blíðar heilsanir
Annika Petersen
Umhvørvis- og vinnumálaráði